# Myndir til jólagávu?

- so ræður um at skunda sær!

Hevur tú onkuntíð verið her og fingið tikið eina portrettmynd, sum tú nú ætlar at geva í jólagávu? So hjálpi eg tær fegin við tí - eg átaki mær at gera kopi í ymsum støddum.

Men myndirnar mugu vera mær í hendi **í seinasta lagi** 10. desember 2005.

Per á Hædd
Fotoatelier tlf. 31 71 11

## Bók um Sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum

**Áminning:**
Heitt verður á allar sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava fingið spurnarblað til bókina um sjúkrarøktarfrøðingar, um at senda tað innaftur sum skjótast.

**Áheitan:**
Somuleiðis verður heitt á allar sjúkrarøktarfrøðingar, burturin sum heima, sum ikki hava fingið spurnarblað, um at venda sær til Felagið.

Eisini verður heitt á avvarðandi ella kenningar hjá sjúkrarøktarfrøðingum, ið ikki longur eru førar fyri at siga søgu sína, ella ikki eru okkara millum longur, um at seta seg í samband við Felagið.

Umráðandi er, at vit fáa so nógvar sum gjørligt við í hesa fyrstu útgávuna av bók um føroyskar sjúkrarøktarfrøðingar, sum eftir ætlan kemur út í komandi ári.

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Tel 31 13 09 · Fax 31 62 72
Teldupostur: sff@sff.fo

## 1-ÁRIGT BASISKURSUS I MISBRUGSBEHANDLING

*Gjáargarður, Gjógv - Start marts 2006*
*Tilmelding senest 1. februar 2006*

*For information kontakt:*
*Martin Kúrberg, Eiði 26 55 71*
*Jesper Grubach, Danmark 0045-7458 5111*

**Institut for Misbrugsbehandling og Pskykoterapi, Danmark**

**www.misbrugsdannelsen.dk**

# Útibarnagarðurin Fjallafípan í Klaksvík

Søkt verður eftir 2 námsfrøðingum at byrja 1. februar 2006, ella eftir nærri avtalu.
Størvini eru 30 tíma vika. (Møguleiki er fyri fleiri tímum).

**Pedagogar, ið fáa prógv í februar eru vælkomnir at søkja.**

Útibarnagarðurin Fjallafípan er ein kommunalur stovnur við 55 børnum í aldrinum 3 til 7 ár. Fjallafípan liggur í einum sera náttúruríkum og avbjóðandi umhvørvi tætt, við haga og fjøru.

**Vit søkja fólk ið:**
- taka børn í álvara og setur seg á støði hjá barninum
- hevur áhuga at vera úti í náttúruni saman við børnum
- duga at síggja avbjóðingar fram um avmarkingar
- vil leggja dent at samstarva við foreldur, starvsfelagar og børn

Vit bjóða eitt starv, har viðkomandi sleppur at vera við at mynda arbeiði á stovnum og gerandisdagin hjá børnum.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 7. januar 2006.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

**Útibarnagarðin Fjallafípan**
v/ Jóhannu Vest · FO-700 Klaksvík
Tlf. 458415

# Avloysari fyri deildarleiðara í farloyvi

**Til Keypssamtøkuna á Skálafjørðinum søkja vit eftir deildarleiðara at byrja skjótast gjørligt. Talan er um avloysarastarv, ið er tíðaravmarkað til 1. nov. 2006.**
**Starvið er fulltíðarstarv, í einum spennandi og mennandi handilsumhvørvi, har nærlagni og skjótleiki seta sín dám á gerandisdagin.**
**Lønin er sambært avtalu.**
**Umsóknarfreist er 26. nov. 2005.**

**Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðumannin, Finn Nielsen, á tel. 210214.**

Skrivlig umsókn at stíla til

**Føroya Keypssamtøku**
**Postboks 349**
**FO 188 Hoyvík**



eb/streymur CUP

## Vit bjóða til Innadura fótbóltskapping

### á Eiði 25., 26. og 27. nov.

**ALDURSBÓLKAR**

| | |
|---|---|
| GENTUR 6 - 7 ár | (F. 1998 - 99) |
| PINKUR 8 - 9 ár | (F. 1996 - 97) |
| GENTUR 10 - 11 ár | (F. 1994 - 95) |
| SMÁGENTUR 12 - 13 ár | (F. 1992 - 93) |
| GENTUR 14 -17 ár | (F. 1988 - 91) |
| PINKULINGAR 6 - 7 ár | (F. 1998 - 99) |
| SMÁPILTAR 8 - 9 ár | (F. 1996 - 97) |
| PILTAR 10 - 11 ár | (F. 1994 - 95) |
| SMÁDREINGIR 12 - 13 ár | (F. 1992 - 93) |
| DREINGIR 14 -15 ár | (F. 1990 - 91) |
| UNGLINGAR 16 -19 ár | (F. 1986 - 90) |
| OLDBOYS 35 ár og eldri | (F. 19?? - 70) |

Unglingar og Oldboys leikað fríggjakvøldi 25., meðan hini liðini leikað leygardagin 26. ella sunnudagin 27.

Við liðunum hjá Gentum 14-17, Dreingjum 14-15, Unglingum og Oldboys leikað 4 leikarar, málverji íroknaður. Við hinum liðunum leika 5 leikarar, málverji íroknaður.

Loyvt er at hava ein skiftisleikara á hvørjum liði.

Liðini skulu hava egin nøvn, ella nevnast eftir fótbóltsfeløgum t.d. EB/Streymur, liverpool, HB osv.

Heiðursmerkir verða latin til nr. 1, 2 og 3 í hvørjum aldursbólki.

Tilmelding á tlf 508090 ella 508586.
Seinasta freist at boða frá luttøku er týsdagin 22. november

Kostnaðurin er kr. 200,- fyri hvørt lið.

**EB/Streymur**

## Minnisgrunnur Sjúrðar Nickels Lützens

Eftir ynski fyrrverandi skúlastjóra Christoffer Lützens varð, eftir deyða hansara, stovnaður grunnur til minnis um son hansara Sjúrð Nickels Lützen. Sjúrður Nickels Lützen, ið las enskt og latín, doyði t. 18. sept. 1950.

Úr minnisgrunni Sjúrðar Nickels Lützens verður stuðul latin lesandi føroyingum á hægri lærustovnum. Frammihjárætt til henda stuðul hava umsøkjarar, ið lesa enskt ella latín.

Við verandi lágu rentu hevur ávøksturin av stovnsfænum verið lítil og nevndin fyri grunnin hevur í nøkur ár ikki hildið tað verið ráðiligt at lata studning.
Í ár er so samtykt aftur at veita studning.

Umsøkjarar kunnu fáa umsóknarblað við at venda sær til Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Hoydalar, FO-188 Hoyvík, tlf. 312973, fax 318624, T-postur: skrivstovan@hoydalar.fo

Møguligar umsóknir eiga at verða latnar Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í seinasta lagi 1. febr. 2006.

Vegna stýrið
Mads A.Winther, rektari"

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
Hoydalar - FO-188 Hoyvík · Tel 31 29 73 - Fax 31 86 24
T-postur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30